gult cyan magenta svart



# Álopsessið hjá NSÍ leikbannað

*Toftamenn fara í morgin, tá teir fara á vøllin í Runavík, at vita, hvat skal til fyri at varðveita oddasessin*

Grannauppgerðin í Runavík í morgin verður klokkan 17. Fyrireikararnar av felags sunnudagsskúlanum, sum verður á Svangaskarði ella í ítróttarhøllini í Runavík – um líkindini ikki vera til at vera uttandura – hava heitt á NSÍ um at flyta dystin til klokkan 17, og tað hevur NSÍ gjørt. Talan er um fjórði síðsta umfar. Um talan hevði verið um triðisíðsta umfar, so hevði hetta ikki borið til. Ásetingarnar siga, at í trimum teimum síðstu umførunum skulu allir dystirnir spælast í senn.

Eftir summarsteðgin hevur NSÍ tikið øll stigini frá tveimum av oddaliðunum. Í morgin fæst at síggja, um teir fara at megna tað ímóti B68, sum teir hava megnað ímóti HB og VB.

Tá vit tosaðu við teir í NSÍ, vóru teir ikki heilt greiðir yvir, hvussu tað fór at vera, men nógv bendi á, at Christian Høgni Jacobsen og Sonni Lamhauge Petersen verða leikbannaðir í morgin:

– Sonni fekk reytt kort í Gøtu, og Christian Høgni fekk triðja gula kortið. Í ásetingunum verður sagt, at leikbannini skulu sitast av í vakstramannadeildini. Vit halda, at hetta kann tulkast soleiðis, at teir sótu leikbannini av sær, tá 2. deild spældi síðsta vikuskifti, meðan 1. deild helt frí. Hetta hava vit sagt við kappingarnevndina hjá FSF, men vit hava ikki fingið endaligt svar frá teimum, segði NSÍ venjarin, Trygvi Mortensen, fyrrapartin í gjár.

*Ta lættir um hjá B68, sleppa teir frá at hugsa um Christian Høgna Jacobsen*

Gert Langgaard er plágaður av knæskaða. Felags fyri allar hesar tríggjar er, at teir síðani summarsteðgin hava verið millum mest eyðsýndu menninar í álopspartinum hjá NSÍ.

### Jan við aftur

Tá toftamenn av álvara settu KÍ upp á pláss, var Jan Petersen ikki við, tí hann var leikbannaður. Jan Dam fór út í 2. hálvleiki, og orsaka av trupulleikum við knænum gav hann avboð til landsdystin ímóti Slovenia.



Jan Dam og Jan Petersen eru báðir tøkir aftur. Øssur Jacobsen loysti Jan Dam av síðstu løtuna ímóti KÍ. Tá fekk hann eitt gult kort og er leikbannaður í morgin.

Hóskvøldið vandu toftamenn í ítróttarhøllini í Runavík, meðan NSÍ vandi á vøllinum uttanfyri høllina. Toftamenn plaga at leiga høllina hóskvøld.

Síðani NSÍ í 1997 kom aftur í bestu deildina, hava teir rættuliga havt takið á B68 í Runavík. Í 1997 vunnu teir 2–1, í 1998 4–1 og í fjør 5–0. Í 1995 vann B68 5–0 í Runavík.

JH

# Uni skorar hvørja ferð

*Føroyski álopsmaðurin tryggjaði Akranesi pláss í íslendsku steypafinaluni, sum verður ímóti ÍBV 24. september*



Eftir at hann í nógvar vikur fyrr í summar var noyddur at liggja bakk, tí hann var skaddur í økslini, hevur Uni Arge, sum sunnudagin á Svangaskarði vísti, at hann er sera væl fyri, rættuliga fingið luft undir veingirnar fram ímóti endanum á kappingarárinum.

Í morgin fær ÍA vitjan úr Keflavík. Talan er um næstsíðsta umfarið í Landssímadeildini, og teir á Akranesi vóna, at Uni Arge fer at gera eins nógv um seg, sum hann hevur gjørt tær síðstu ferðirnar. Áðrenn hann fór heim til Føroya at spæla landsdyst skoraði hann ímóti KR á útivølli í Reykjavík, so skoraði hann fyrra málið ímóti Slovenia á Svangaskarði, og mikukvøldið var hann aftur upp á spæl.

Í hálvfinaluni í steypakappingini bendi alt á, at FH av Hafnafjørðinum skuldi vinna finaluplássið, og at teir av Akranesi skuldu standa vónbrotnir eftir við ongum. Tá vanliga leiktíðin var farin, var støðan 0–1. FH hevði eftir skjótálop lagt seg á odda, tá 70 minuttir vóru farnir.

Dómarin legði fýra minuttir afturat, og tað vóru bara tjúgu sekund eftir av longdu leiktíðini, tá Uni Arge syrgdi fyri longdari leiktíð. Sum ein rættur boksspælari, sum teir plaga at kalla tað, var hann á rætta staðnum í málteiginum, tá innlegg kom innfyri. Uni setti skallan undir bóltin, sum spenti netmeskarnar, og harvið var neyðugt við longdari leiktíð.

Einki mál kom í longdu leiktíðini, sjálvt um FH hevði ein risa møguleika, tá teir fingu brotsspark. Ólafur Þór Gunnarsson, málverjin hjá ÍA, var onnur av hetjunum hjá heimaliðnum. Hann bjargaði bæði brotssparkinum í longdu leiktíðini og einum brotssparki, tá tað var neyðugt at finna vinnaran í longdari leiktíð.

Hin hetjan hjá ÍA var Uni Arge, sum skoraði uppá síðsta brotssparkið.

ÍA skal spæla finalu á Laugardalsvøllinum í Reykjavík sunnudagin 24. september. Hetta verður 17. ferðin, at ÍA verður annar parturin í steypafinaluni. Uni Arge hevur eina ferð áður verið í finaluni. Tað var í fyrraárið, tá Leiftur tapti á Laugardalsvøllinum.

Mótstøðuliðið hjá ÍA verður ÍBV úr Vestmannaoyggjunum. Heldur ikki hjá teimum stóð nakað serligt til. Teir spældu týskvøldið hálvfinalu á heimavølli ímóti Fylkiri, sum í síðstu løtu misti finaluplássið.

### Síðsti møguleikin

Av nógvum verður mett, at møguleikin hjá Leiftri at halda fram í bestu deildini er mest sum fokin. Í morgin fáa teir á Ólafsfirði vitjan av Fram úr Reykjavík. Fram er triði niðast, og hjá Leiftri er setningurin púra greiður. Um nakar hugsningur skal vera um at halda fram í bestu deildini, so skulu teir vinna. Tað er ikki víst, at tað verður nóg mikið hjá Leiftri at vinna báðar dystirnar, sum eru eftir at spæla.

Jens Martin Knudsen verður ikki á liðnum hjá Leiftri í morgin. Hann er leikbannaður.

Í íslendskum fjølmiðlum hevur upp undir vikuskiftið verið gjørt ikki so lítið burturúr, at møguleiki er fyri, at Neville Southall, sum í mong ár var málverji hjá Everton og Wales, kanska skal vera venjari hjá Fram. Venjarin, sum teir hava havt í ár, hevur boðað frá, at hann fer ikki at halda fram. Teir hava lýst eftir nýggjum venjara, og Neville Southall hevur søkt.

JH

# Rógvi verður við

*Við fíggjarligum stuðuli úr Vági, kemur Rógvi Johansen heim til FM í einkultstarti*



JÁKUP MØRK

Rógvi Johansen boðaði hóskvøldið frá, at hann verður við, tá FM í einkultstarti skal avgreiðast leygardagin.

Rógvi hevur áður víst á, at tað so at siga var ógjørligt hjá sær at koma heim til FM kappingarnar, tí hesar vóru spjaddar um fleiri vikuskifti, og at tað tí gjørdist ov kostnaðarmikið hjá sær at ferðast.

### Heimbygdin hjálpir

Nú hava so fleiri vágbingar, saman við Fa. Ellen Dahl, traðkað til, soleiðis at fremsti súkklari okkara aftur kann verja FM-heitið. Eitt heiti, sum hann hevur havt seinastu seks árini.

Rógvi sigur annars, at hann framhaldandi er av teirri áskoðan, at FM-kappingarnar áttu at verið avgreiddar um eitt vikuskifti. Møguliga skipað saman við einum umfari av Grand-Prix kappingini.

At Rógvi leggur stóran dent á at verja heitið, er eingin ivi um. Hann hevur nevnliga givið avboð til eina Post-Danmark kapping, sum hetta vikuskifti verður á Sælandi, tí hann tekur FM kappingina fram um hetta.

At hann er harmur um, at hann ikki fekk vart heitið á 100 km teininum er eingin loyna, men vón hansara er, at hetta kann lata seg gera komandi ár.

- Eitt FM. eigur og skal verða nakað serligt. Eitt FM. eigur og skal hava so nógvar av av okkara bestu súkklarum við og tað verður ikki gjørt við at draga kappingarnar, út yvir fleiru vikuskifti, sigur Rógvi Johansen, sum annars vónar, at uppmøtingin til kappingina verður fjølment.

gult cyan magenta svart



Thunderbird
Telda
Thunderbird Gold 750MHz
128MB RAM PC-133
15.3GB harðdisk, 7200RPM, 2MB
Geforce skermkort 32MB / 17" litskerm
10x DVD ROM / 40x CD-ROM
ljóðkort / 90W hátalarasett
56K modem / knappaborð / mús
Windows 98
+ 1 DVD film - eftir egnum vali!
einans kr. 15.599,-
Prísurin er íroknað MVG. Fígging kann útvegast.
SpF Teldu Tænastan
Staravegur 5 - Telefon 317620 - Heimasíða www.tt.fo

"Túgvu"-vikuskifti



Royn eina av smáttunum í Kvívík. Ógloymandi upplivilsi fyri vaksin og børn.
"Túgvurnar" eru 27m² til støddar og útgjørdar við øllum hentleikar.
Hvør smátta hevur pláss fyri 4 vaksnum ella familju við børnum.
Dýnur og koddar eru til taks, so tygum nýtast bert hava seingjaklæðir við.
Kostnaður fyri eina viku er kr. 3.000,-, fyri vikuskifti kr. 1.200,- og fyri ein dag kr. 500,-.
Depositum er kr. 1.000,-.
GLITNIR
Tel. 320532 (best eftir kl. 13.00)
Teldupost: glitnir@glitnir.fo

DesignaKnit
Um nóg stór undirtøka verður, er ætlanin at hava frálæru í bindiforritinum DesignaKnit 22-23/9-2000.
Skeiðið verður hildið í Havn.
Seinasta freist at boða frá luttøku er leygardagin 16/9-2000.
Tilmelding á tel. 25 11 82

Marknaðar samskipari
..til TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
marknaðarføring
produktir
tænastur
Tryggingarfelagið Føroyar søkir eftir einum fólki til áhugavert starv á Marknaðardeildini.
Starvið
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og avbjóðandi, og fevna bæði um innanhýsis marknaðarføring og uttanhysis marknaðarføring av produktum og tænastum felagsins.
Førleiki
Vit vænta:
• at tú hevur útbúgving innan marknaðarføring frá hægri handilsháskúla ella líknandi, og/ella praktiskar royndir innan marknaðarføring
• at tú hevur góðan teldukunnleika og dámar væl at arbeiða við kreativum uppgávum
• at tú arbeiðir sjálvstøðugt og dámar væl nýggjar avbjóðingar
• at tær dámar væl at samstarva, og dugur væl at orða teg í skrivt og talu
Sjálvstøðugt og avbjóðandi
Vit bjóða eitt sjálvstøðugt starv við góðum møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning.
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdin og AFF.
Umsókn
Umsóknir, saman við prógvum og viðmælum, skulu verða Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi 25. september 2000.
Nærri upplysingar um starvið fáast við at venda sær til Henry Olsen, deildarstjóra, á telefon 345 509 ella 211 715.
TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
The Faroe Insurance Company
Kongabrúgvin
P.O.Box 329
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345600
Fax +298 345601
tf@trygging.fo
www.trygging.fo

Original bosal Útstoyt
p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjørður
Tlf. 444405
Fax444629

GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI
Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið
Til útisetar í Danmark
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað
Danstein
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð
Skjót levering
Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN
www.danstein.fo